NORÐOYA SPARIKASSI

# ESG-FRÁGREIÐING **2025**



# INNIHALDSYVIRLIT

## TABLE OF CONTENTS


UM NORÐOYA SPARIKASSA / About ........ 3

UMHVØRVI / Environment ........ 4
Egið útlát ........ 5
Avleitt útlát ........ 6
Útlát frá útlánum ........ 6
Burturkast ........ 7
Átøk fyri at minka um avleidda útlátið ........ 7

SOSIALT / Social ........ 8
Starvsfólk ........ 8
Trivnaður og tryggleiki ........ 8
Trygdarskipan ........ 9
Starvsfólkaumboð ........ 9
Trivnaður í tølum ........ 10
Førleikamenning og útbúgving ........ 11
Viðskiftafólk ........ 11
Okkara tænastur á grønu leiðini ........ 12
Samfelagið ........ 14
Samfelagslig ávirkan ........ 14
Latnar gávur og stuðul ........ 14

LEIÐSLA / Governance ........ 16
Álítandi virkisleiðsla ........ 16
Fyristøða Sparikassans ........ 16
Málsetningur fyri undirumboðaða kynið í nevndini ........ 18
Sunn virkismentan ........ 18
Whistleblower-skipan ........ 18
Hvítting og fígging av yvirgangi ........ 18
Leypandi menning og útbúgvingar ........ 19
Dátatrygd ........ 19

ESG-lyklatøl / ESG key figures ........ 21
Umhvørvið / Environmental ........ 21
Sosialt / Social ........ 21
Leiðsla / Governance ........ 21
Nýttur roknskaparháttur ........ 22


# UM NORÐOYA SPARIKASSA

## ABOUT

Norðoya Sparikassi er ein ábyrgdarsparikassi og er sostatt ein sjálvsognarstovnur. Hetta merkir, at tað eru viðskiftafólk okkara, ið hava møguleika at tekna ábyrgdarpening í Norðoya Sparikassa.

Sum ábyrgdarsparikassi eru ongir partaeigarar, ið skulu hava lut í yvirskotinum. Hetta gevur okkum størri rásarúm til at gera mun í nærsamfelagnum, har vit m.a. stuðla felagsskapum, feløgum og mentan.

Vit eru her fyri okkara viðskiftafólk og nærsamfelagið og hava lagt okkara virksemi soleiðis til rættis, at vit vilja gera mun í føroyska samfelagnum við at veita fíggjarligar tænastur til privat og vinnurekandi. Eisini vilja vit vera við til at styrkja um møguleikan at búgva og virka í egnum nærumhvørvi.

Vit eru errin av at vera Føroya elsti peningastovnur, og tað ynskja vit framhaldandi at vera. Tí vilja vit eina burðardygga menning við atliti at umhvørvi, fólki og nærsamfelagi. Hetta er ein menning, sum nøktar tørvin hjá núverandi ættarliðum uttan at seta tørvin hjá framtíðarættarliðum í vanda.




**Norðoya Sparikassi**

Einasti ábyrgdarapeningastovnur í landinum

**Stovnaður:** 24. september 1919

*Føroya elsti peningastovnur*

**Høvuðssæti:** Ósávegur 1, Klaksvík

**Starvsfólk:** 54

**Deildir:** 3

# UMHVØRVI

## ENVIRONMENTAL

Sparikassin hevur sett sær sum mál at lýsa okkara umhvørvisfótaspor. Hetta fyri at Sparikassin áhaldandi kann mennast við atliti at umhvørvinum. Tað er okkara aðalmál sum sjálvsognarstovnur, at vit kunnu lata okkara næsta ættarliði ein sunnan og burðardyggan sparikassa, ið eisini tekur atlit at umhvørvinum.



**Vav 1**
Beinleiðis útlát frá bygningum, akførum og brennievni, sum vit eiga ella hava ræðið á.

**Vav 2**
Útlát frá elnýtslu, sum vit óbeinleiðis elva til, tá orkan, sum vit keypa og nýta, verður framleidd.

**Vav 3**
Óbeinleiðis útlát frá virksemi, sum fyritøkan ikki eigur ella hevur ræðið á. Útlátið stavar frá virðisketuni og verður ikki roknað við í vav 1 ella vav 2.









## Egið útlát

Orkuskifti er eitt av stóru avbjóðingunum í okkara samtíð, og tekur sparikassin eisini ábyrgd á hesum øki. Sparikassin ætlar at minka um $CO_2$-útlátið við orkusparandi íløgum í egnar bygningar og við at gagnnýta varandi orkukeldur til bygningar og bilar.

Í 2022 settu vit sjøtul á at rokna okkara egna útlát frá beinleiðis virksemi, ið fevnir um olju- og el-nýtslu frá bilum og bygningum hjá Sparikassanum. Hetta útlátið verður bólkað sum vav 1 og vav 2.

### Útlátið minkar

Hóast fetini á leiðini at minka um $CO_2$-útlátið eru mong, hevur tað inntil víðari gingist væl. Samlaða $CO_2$-útlátið fyri vav 1 og 2 var 105 tons í 2025 sammett við 173 tons í 2021. Hetta svarar til eina minking upp á 39% yvir 4 ár.

Arbeiðið við at minka um egið útlát gongur framá. Hyggja vit at útlátinum í vavi 1, sum er beinleiðis útlát frá bygningum og akførum, sum vit antin eiga ella hava ræðið á, sæst, at útlátið minkaði við 77 tonsum – úr 131 tonsum í 2021 niður í 54 tons í 2025. Hetta svarar til eina minking upp á 59%.

Í árinum er $CO_2$-útlátið í vavi 1 minkað við 9 tonsum, svarandi til eina minking upp á 14%. Orsøkin til minkingina í 2025 stavar serliga frá tveimum átøkum:

Deildin í Havn flutti í nýggj orkusparandi hølir á Óðinshædd, ið verða upphitað við varandi orku, meðan deildin í Fuglafirði legði um frá oljufýri til jarðhita. Umleggingarnar vórðu framdar seint í árinum, og væntast útlátið í vavi 1 at minka enn meira í 2026.

Hyggja vit nærri at $CO_2$-útlátinum í vavi 2, sum er útlát frá elnýtslu, ið vit óbeinleiðis elva til, er gongdin ein onnur. $CO_2$-útlátið øktist úr 42 tonsum í 2021 til 51 tons í 2025, svarandi til eina øking upp á 21%. Hækkandi gongdin í vavi 2 er ein natúrlig gongd, tá lagt verður um frá oljufýri til hitapumpuskipanir, ið hava tørv á streymi.

$CO_2$-útlátið knýtt at el-nýtsluni hjá Sparikassanum verður roknað út frá samlaðu orkunýtsluni og samansetingini av orkukeldunum á føroyska el-netinum. Hetta merkir, at útlátið í stóran mun er tengt at, hvussu streymframleiðslan hjá SEV er samansett. Fyri at minka um samlaða $CO_2$-útlátið er neyðugt, at útlátið frá el-orkuframleiðsluni í Føroyum verður munandi lækkað og upp á sikt nærkast null.

Sparikassin hevur í 2025 skift úthurðar og nøkur vindeygu í høvuðsbygninginum. Nýggju hurðarnar og vindeyguni eru meira orkusparandi, og kemur hetta at minka enn meira um orkutørvin. Í 2026 væntast fleiri vindeygu í bygningspartinum frá 1928 og 1950'unum at verða skift.

## Avleitt útlát

Ein av afturvendandi avbjóðingunum við vavi 3 er, at tað vanta neyvar dátur til uppgerðina. Arbeiðið við at greina vav 3 er tó farið í gongd, og verður $CO_2$-roknskapurin hjá Sparikassanum leypandi víðkaður. Vit hava í árinum víðkað um roknskapin og taka hædd fyri útláti frá vinnuvirksemi, ið er ein partur av bólki 15.

Bólkur 6 fevnir um ferðir hjá starvsfólkum í arbeiðsørindum við flutningstóli, sum triði partur eigur ella rekur, meðan bólkur 7 fevnir um pendling hjá starvsfólkum millum heim og arbeiðspláss.




| Útlátsbólkur | Eind | 2025 | 2024 |
|---|---|---|---|
| Vav 3, bólkur 6 – Arbeiðsferðir | $tCO_2e$ | 12,4 | 17,4 |
| Vav 3, bólkur 7 – Starvsfólkaferðing | $tCO_2e$ | 28,5 | 31,0 |
| Vav 3, bólkur 15 – Íløgur og útlán* | $tCO_2e$ | 5.335,4 | 542,7 |
| *Útlán til vinnu* | *$tCO_2e$* | *4.838,1* | |
| *Útlán til akfør* | *$tCO_2e$* | *497,3* | *542,7* |

** Fevnir bert um útlát frá vinnuligum virksemi og akførum.*

## Útlát frá útlánum

Bólkur 15 í vavi 3 umfatar tær tænastur, ið Sparikassin bjóðar viðskiftafólkunum. Tænastuveitingarnar eru m.a. íløgur, fígging til bústaðir, akfør, vinnu o.s.fr.

### Fígging av akførum

Sparikassin hevur í 2025 uppgjørt útlátið, ið stavar frá fíggjaðum akførum. Til uppgerð av útlátinum, ið stavar frá lánum til akfør, hava vit nýtt eitt $CO_2e$-modell hjá Finans Danmark. Útlátsfaktorarnir í modellinum stava frá National Center for Miljø og Energi, Aarhus Universitet (DEC), meðan Akstovan hevur veitt dátur til uppgerð av miðal koyrdum kilometrum.

Sparikassin metir, at dátagóðskan er á nøktandi støði, og at uppgerðin er umboðandi.

| Motorslag | Útlán (mió. kr.) | Fíggjað útlát av billánum ($tCO_2e$) | $CO_2$ e-útlát pr. 1 mió. kr. |
|---|---|---|---|
| El | 14,7 | 8,8 | 0,6 |
| Hybrid | 7,1 | 37,5 | 5,3 |
| Bensin | 36,0 | 236,5 | 6,6 |
| Diesel | 21,4 | 214,5 | 10,0 |
| **Samlað** | **79,2** | **497,3** | **6,3** |

### Fígging av vinnuvirkemi

Útlát frá vinnulánum í 2025 eru roknað við støði í vinnugreinabýttum miðaltølum úr donskum hagtølum. Til at meta um útlátið frá vinnukundum hava vit nýtt eitt $CO_2e$-modell frá e-nettet, har útrokningarnar byggja á samanløgd miðaltøl fyri vinnugeiran í Danmark. Hendan framferð hevur við sær avmarkingar í dátagóðskuni, tí mett verður út frá miðaltølum heldur enn ítøkiligum útlátstølum frá einstøkum kundum. Tí verður dátagóðskan í hesum sambandi mett at vera á stigi 5.

| | Útlán (mió. kr.) | Fíggjað útlát ($tCO_2e$) | $CO_2$ e-útlát pr. 1 mió. kr. |
|---|---|---|---|
| Vinnuligt útlán samlað | 556,6 | 4.838,1 | 8,7 |

### Fígging av fastogn

Í 2024 fóru peningastovnarnir undir eitt samstarv við Elektron, orkuveitarar, Umhvørvisstovuna og Landsbankan um at menna ein dátagrunn við orkudátum. Endamálið er at styrkja grundarlagið undir hagtølum til útlátsroknskapin hjá fíggjarstovnunum. Í fyrstu atløgu fevnir arbeiðið um útlát av vakstrarhúsgassum frá bústøðum og bygningum. Loysnin væntast klár í 2026.



## Burturkast

Ein liður í at minka um orkunýtsluna er at gagnnýta tað tilfeingið, sum er til staðar. Tí er avgerð tikin um, at øll starvsfólk í størri mun skulu skilja burturkastið í tráð við vegleiðingina hjá brennistøðini í atvinnukommununi. Umframt skiljing av burturkasti hevur Sparikassin í samstarvi við staðbundna gartnaran gjørt av at skilja matleivdirnar frá restburturkastinum. Endamálið við hesum er at minka um burturkastið og at gagnnýta matleivdirnar sum sankutøð í urtagarðinum.



Arbeitt verður áhaldandi við at minka um samlaða burturkastið, umframt at ein størri partur av burturkastinum skal sendast til endurvinningar. Í 2023 og 2024 fór ⅕ av samlaða burturkastinum hjá Norðoya Sparikassa í Klaksvík til endurvinningar. Parturin til endurvinningar minkaði tó nakað í 2025, men væntast at økjast aftur í 2026.

| Burturkast | Eind | 2025 | 2024 | 2023 | 2022 | 2021 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Burturkast tilsamans | t | 9,6 | 5,8 | 6,0 | 5,7 | 9,4 |
| Burturkast til endurvinning | t | 1,6 | 1,2 | 1,2 | 0,7 | 4,3 |
| Partur til endurvinning | % | 17 | 20 | 20 | 12 | 46 |

## Átøk fyri at minka um avleidda útlátið

Norðoya Sparikassi arbeiðir støðugt við at menna tænastur, ið kunnu vera við til at minka um útlátið frá okkara tænastum. Eitt nú bjóðar Sparikassin trý ymisk lán, ið verða veitt til viðskiftafólk, sum ynskja at vera við í grønu umleggingini.

Sparikassin hevur til dømis sett á stovn tvey lán til bústaðin, eitt orkulán og eitt grønt bústaðarlán. Orkulánið gevur møguleika fyri at fíggja orkubetringar av bústaðnum, meðan grøna bústaðarlánið er eitt lán til bústaðir við øðrari orkuskipan enn oljufýri til lægri rentu.

Harumframt bjóðar Sparikassin eitt billán til elbilar við lægri rentu enn lán til bensin- og dieselbilar.

### Gongdin í 2025

Viðskiftafólk okkara hava tikið væl ímóti hesum tænastum, og hava vit í 2025 sæð ein øktan eftirspurning:

- Minking í elbilalánum: 4,6 %
- Vøkstur í grønum bústaðarlánum: 31,8 %
- Vøkstur í orkulánum: 11,9 %

Slaka gongdin hjá bilasølunum sæst aftur í fíggingum av akførum í 2025. Men hóast talan er um eina minking av elbilalánum, verða lutfalsliga fleiri elbilar fíggjaðir í mun til samlaðar fíggjaðar bilar.

Av samlaðum útlánum Sparikassans umboða útlán, ið eru við til at minka um útlátið, 29 % av samlaðu útlánunum. Hetta er ein vøkstur uppá 5 %-stig sammett við 2024.

# SOSIALT

SOCIAL

Norðoya Sparikassi arbeiðir við sosialum viðurskiftum bæði hjá starvsfólkum, kundum og nærsamfelagnum.

## Starvsfólk

Ein týðandi partur í strategiini hjá Sparikassanum er at verða verandi eitt attraktivt arbeiðspláss, sum dregur til sín, heldur fast um og mennir dugnalig starvsfólk, sum kunnu virka fyri, at Sparikassin røkkur sínum málsetningum. Tí leggja vit stóran dent á at skapa góðar karmar og møguleikar, sum stuðla menningini hjá starvsfólkunum og tryggja eitt gott arbeiðsumhvørvi.

## Trivnaður og tryggleiki

Við ársenda 2025 høvdu 54 starvsfólk tilknýti til Sparikassan, og hevur hetta sínar fyrimunir. Ein av fyrimununum er, at tað er opið samskifti millum starvsfólk, leiðarar og leiðslu. Fyri at tryggja trivnað og tryggleika, og at øll starvsfólk verða hoyrd, hevur Sparikassin grundfest hesi viðurskifti í viðtøkum og politikkum. Hóast yvirskipaðu arbeiðsumstøðurnar verða skipaðar eftir sáttmálasamráðingum á arbeiðsmarknaðinum, ynskir Sparikassin at stuðla uppundir góð arbeiðsviðurskifti hjá starvsfólkunum. Arbeiðsumstøðurnar verða skipaðar gjøgnum innanhýsis politikkir fyri at tryggja, at Sparikassin er og verður eitt gott arbeiðspláss fyri bæði núverandi og komandi starvsfólk. Niðanfyrinevndu politikkir og leiðreglur seta karmarnar fyri góð arbeiðsviðurskifti:

- Starvssáttmáli
- Lønarpolitikkur
- Eldrapolitikkur
- Politikkur fyri sunna virkismentan
- Avtala um flextíð
- Starvsfólkahondbókin







**Flextíð**

Sparikassin ynskir at styðja uppundir ein gerandisdag í javnvág. Starvsfólk hjá Sparikassanum hava møguleika at skipa ein liðiligan arbeiðsdag við atliti at tørvinum á einstøku deildini. Hetta er til gagns fyri tey við familju ella øðrum tørvi á smidleika.

## Trygdarskipan

Arbeiðsumhvørvislógin áleggur arbeiðsplássum at samskipa trygdar- og heilsuarbeiði á arbeiðsplássinum. Í sparikassanum hava vit samskipað hetta arbeiðið í eina trygdarskipan. Um starvsfólk hava við spurningar, ivamál, klagur og/ella uppskot, sum hava sum endamál at betra arbeiðsumhvørvið, kunnu tey venda sær til trygdarumboðið fyri síni øki.

Trygdarbólkurin skal ansa eftir, at arbeiðsumstøðurnar eru í lagi, og at arbeiðið verður gjørt sambært reglunum. Trygdarbólkurin skal eisini kunna starvsfólkini á arbeiðsplássinum um, hvørjar reglur eru galdandi fyri trygd og heilsu, og skal virka fyri, at hesar reglur verða hildnar. Trygdarbólkurin skal taka lut í ráðleggingini, tá tað snýr seg um trygd og heilsu. Harafturat skulu limirnir í trygdarskipanini taka trygdarskeið, ið er góðkent av Arbeiðs- og Brunaeftirlitinum.

## Starvsfólkaumboð

Fjórða hvørt ár verða trý starvsfólk vald sum umboð í nevndina í Sparikassanum, og hava starvsfólkini møguleika at siga sína hugsan og føra síni sjónarmið fram við starvsfólkaumboðini. Uppgávan hjá starvsfólkaumboðunum er, umframt vanligt nevndararbeiði, at umboða áhugamálini hjá starvsfólkunum mótvegis leiðsluni, og hava tey ein týðandi leiklut í at fremja gott samstarv og eitt jaligt arbeiðsumhvørvi í Sparikassanum. Sparikassin ynskir at eggja til opið og konstruktivt samskifti við starvsfólkaumboðini, og verður hetta mett at styrkja samstarvið og arbeiðsumhvørvið.

## Trivnaður í tølum

Hóast stutt er millum starvsfólk og leiðslu, verða regluligar trivnaðarkanningar gjørdar. Endamálið við trivnaðarkanningunum er at fáa djúpari innlit í upplivingarnar hjá starvsfólkunum. Trivnaðarkanningarnar geva eina greiða støðumynd og eru við til at tryggja, at setast kann inn, har tað hevur størstu ávirkan at betra um trivnaðin. Tey spurdu svara á einum stiga frá 1 til 10, og spurningarnir snúgva seg um m.a. motivatión, treysti, menning og umdømi.

Luttøkan í kanningini var 96% í 2025.

Ein annar liður í at tryggja eitt gott arbeiðsumhvørvi er árligar starvsfólkasamrøður, sum eru gjørdar millum starvsfólk og leiðarar við tí endamáli at samskifta um m.a. trivnað, motivatión og førleikamenning í gerandisdegnum.






*Grafar – Arbeiðsgleði, motivatión og samleiki*





## Førleikamenning og útbúgving

Tað hevur týdning og gevur stórt virði fyri Sparikassan at taka næmingar inn og at førleikamenna starvsfólkini. Ungir, eldhugaðir næmingar eru við til at skapa eitt gott umhvørvi á arbeiðsplássinum. Sum lið í okkara strategi hava vit samstarv við Finanssektorens Uddannelsescenter, og bjóðar Sparikassin øllum starvsfólkum skeið og útbúgvingar her umframt hjá øðrum viðkomandi útbjóðarum. Á sumri 2025 bleiv ein størri útbúgvingarætlan sett í gongd. Endamálið við útbúgvingini er tann góða kundaupplivingin, og luttaka 28 kundaráðgevar í útbúgvingini, sum endar á sumri 2026.

Umframt hesi vóru fleiri í gongd við at útbúgva seg í 2025:

- Tveir nýggir næmingar á deildini hjá okkum í Klaksvík
- Ein næmingur á deildini hjá okkum í Tórshavn
- Ein er HD-lesandi

## Viðskiftafólk

Norðoya Sparikassi ynskir at verða ein viðkomandi og persónligur peningastovnur. Tað er okkara aðalmál, at okkara viðskiftafólk altíð føla seg vælkomin at ringja ella støkka inn á gólvið og fáa eina dygdargóða tænastu.

Tó krevur tíðin eisini, at okkara tænastur eru lætt atkomiligar, soleiðis at viðskiftafólkini sjálvi kunnu avgreiða síni fíggjarviðurskifti, har tey eru, og tá tey vilja. Tí arbeiða vit eisini miðvíst við at talgilda okkara tænastur.

Tað er okkara ynski, at kundin fær avgreitt síni viðurskifti skjótt og lætt.

Tað er okkara missión at virka fyri, at viðskiftafólk okkara hava møguleika at seta búgv í nærumhvørvinum. Tí eru kundar okkara altíð vælkomnir inn til eitt prát, har vit bjóða skynsama ráðgeving um, hvussu dreymarnir kunnu røkkast.

## Okkara tænastur á grønu leiðini





### Grønt bústaðarlán
Við grøna bústaðarláninum hava viðskiftafólk okkara møguleika at velja eitt lán við lagaligari rentu til bústaðin, ið verður hitaður við varandi orku, t.d. jarðhita, fjarhita ella hitapumpu.



### Elbilalán
Er títt næsta bilkeyp ein elbilur, so kunnu vit bjóða lán til elbil, har tú rindar lægri rentu enn á vanliga bilaláninum. Tað er okkara ynski at bjóða kundum okkara eina góða fígging til elbilar, soleiðis at tað skal løna seg at velja grønar loysnir og harvið stuðla grønu umleggingini.

### Orkulán
Orkulán verða veitt til tey, ið ynskja at gera orkubetrandi og umhvørvisvinarligar umvælingar av bústaðinum. Orkulánið er ætlað privatkundum og kann nýtast til:

- at skifta vindeygu
- at skifta tekju ella klædning
- at bjálva bústaðin
- nýggja orkuskipan uttan oljufýr
- onnur orkusparandi tiltøk



## Samfelagið

Í 107 ár hava vit tænt okkara endamáli í nærsamfelagnum, har vit hava ávirkað búskaparligu, mentanarligu og sosialu menningina. Tí hevur tað altíð ligið í okkara samleika, at tað, sum vit forvinna, verður latið aftur til fólkið í nærsamfelagnum. Yvirskipað kann sigast, at vinningurin verður tvíbýttur. Hetta merkir, at ein partur fer til at styrkja um solvensin hjá Sparikassanum, soleiðis at Sparikassin altíð kann lána út pening, eisini í niðurgongdstíðum. Hin parturin verður latin út til samfelagið sum gávur ella stuðul við tí endamáli, at vit øll kunnu støðast, har vit búleikast.

## Samfelagslig ávirkan

Virksemið hjá Sparikassanum hevur ein týðandi leiklut í samfelagsbúskapinum. Sparikassin stuðlar m.a. undir búskapin við útlánum, íløgum og lønum til starvsfólkini. Tá ið lán verða veitt, gevur tað kundum møguleika at gera keyp, ið annars ikki vóru framd, til veruleika. Gjøgnum íløgur hava kundarnir møguleika at seta uppsparda peningin í íløgur við møguligum avkasti yvir tíð, samstundis sum stuðlað verður upp undir samfelagsligan vøkstur og menning. Lønarútgjaldingar til starvsfólkini, sum eftirspyrja vørur og tænastur, skapa keypiorku, og á tann hátt verður samlaða búskaparliga virksemið styrkt.

Sparikassin hevði í 2025 m.a. hesa ávirkan á samfelagsbúskapin:

- Umsetningur: 143,1 mió. kr.
- Útgjald í lønum og lønartengdum gjøldum: 43,9 mió. kr.
- Renta til ábyrgdarar: 1,9 mió. kr.
- Partafelagsskattur: 6,7 mió. kr.
- Gávur og stuðul til almannagagnlig og vælgerandi endamál: 3,1 mió. kr.
- Úrslit: 30,2 mió. kr.

## Latnar gávur og stuðul

Norðoya Sparikassi ynskir at vera ein viðspælari og at gera mun í føroyska samfelagnum. Tí stuðla og samstarva vit við einstaklingar, bólkar, feløg og onnur í nærumhvørvinum, soleiðis at stig, ið annars ikki verða tikin, kunnu gerast veruleiki.

Í 2025 lótu vit 3,1 milliónir krónur í stuðli og gávum til almannagagnlig og vælgerandi endamál í nærsamfelagnum.

Til ber at søkja um stuðul á heimasíðu Sparikassans, www.ns.fo.

**Dømi um gávur og tiltøk í Føroyum**



**Flogbóltsfelagið Mjølnir**
Sparikassin arbeiðir fyri at styrkja ítróttarligu menningina í nærumhvørvinum og er høvuðsstuðul hjá flogbóltsfelagnum Mjølni, ið hevur ein savnandi leiklut í Norðoyggjum.




**Landsinnsavningin hjá Krabbameinsfelagnum**
Í árinum hevur Sparikassin latið gávu til Krabbameinsfelagið; ein felagsskapur, ið veitir hjálp til krabbameinsrakt og sum arbeiðir við upplýsing og gransking á økinum.




**Sjúklingahotellið Tórshavn í Keypmannahavn**
Tryggleiki hevur stóran týdning fyri Sparikassan. Tí hevur Sparikassin latið gávu til sjúklingahotellið Tórshavn í Keypmannahavn. Sjúklingahotellið er ikki bara eitt hotell, men eitt heim burturi frá heiminum – eitt stað, har føroyingar kunnu kenna seg tryggar og væl móttiknar, meðan teir eru til kanningar og viðgerðir í Danmark.

**Latin stuðul**



# LEIÐSLA

GOVERNANCE

## Álítandi virkisleiðsla

Sum peningastovnur hevur Norðoya Sparikassi stóra samfelagsliga ábyrgd og ávirkan. Tí hevur tað týdning at vera ein nærlagdur og ábyrgdarfullur peningastovnur, ið leypandi mennist. Fyri at tryggja eina sunna virkismentan, samstundis sum galdandi lóggáva verður fylgd, verða starvsfólk javnan kunnað um galdandi mannagongdir og politikkir.

Sparikassin metir, at góð virkisleiðsla er ein fyritreyt fyri góðum samstarvi millum Sparikassan og áhugabólkarnar (viðskiftafólk, ábyrgdarar, starvsfólk, nærsamfelagið v.m.) um at røkka góðum úrslitum. Tí heldur Sparikassin seg til tilráðingarnar frá „Ráðnum um góða virkisleiðslu" og Finans Danmark. Endamálið við tilráðingunum er, at støða skal takast til týðandi evni og at skapa størri opinleika um leiðslukarmarnar og harvið økja um álitið hjá áhugabólkunum.

## Fyristøða Sparikassans

Fyristøða Sparikassans er umboðsráð, nevnd og stjórn.

### Ábyrgdarar

Ein og hvør likamligur ella løgfrøðiligur persónur, ið setur pening í Sparikassan, kann gerast ábyrgdari í Norðoya Sparikassa við at gjalda inn kr. 1.000 í ábyrgdarpeningi. Sum ábyrgdari fær ein ávirkan á, hvør myndar umboðsráðið, sum er hægsti myndugleiki Sparikassans.

### Umboðsráðið og umboðsráðsfundur

Umboðsráðið er hægsti myndugleiki hjá Norðoya Sparikassa. Í umboðsráðnum sita 39 umboð, ið verða vald 4. hvørt ár. Umboðsráðið er býtt í tvey øki:

- Norðoyggjar og
- Føroyar annars og útlond.

Fyri økið Norðoyggjar verða 28 limir valdir, meðan 11 limir verða valdir fyri økið Føroyar annars og útlond. Á umboðsráðsfundinum hava umboðsráðslimirnir møguleika at siga sína meining og atkvøða til val av nevndarlimum og grannskoðara umframt at góðkenna viðtøkubroytingar og ársfrágreiðingar.

### Nevndin

Nevndin hevur yvirskipaðu leiðsluna av Sparikassanum um hendi. Tað er nevndin, ið setur stjórn og harvið stjóran í Sparikassanum, og setur hon eisini ta yvirskipaðu kósina fyri Sparikassan. Nevndin hevur eisini ábyrgd av m.a. politikkum, virkisgongdum og viðurskiftum í.s.v. grannskoðan.

Í nevndini sita 6 limir, ið eru valdir av Umboðsráðnum, og sita teir í 3 ár í senn. Upplýsingar um nevndarlimirnar eru at finna í ársfrásøgnini og á heimasíðu Sparikassans. Við ársenda 2025 vóru hesir limir í nevndini:

- Símun Absalonsen (formaður)
- Rúni Heinesen
- Frimodt Rasmussen
- Hans Arni Bjarnason Thomsen
- Elsuba Poulsen
- Rakul B. Gardar
- Tummas Martin Sólsker (starvsfólkaumboð)
- Jørmund Foldbo (starvsfólkaumboð)
- Finnur Klein (starvsfólkaumboð)

### Tilráðingarnevndin

Tilráðingarnevndin er undirnevnd hjá nevndini og verður vald og mannað av nevndarlimum. Tilráðingarnevndin hevur ábyrgd av, at nevndin hevur rættar førleikar, vitan og royndir at loysa tær uppgávur, ið eru álagdar nevnd Sparikassans. Tilráðingarnevndin kemur við m.a. uppskoti um valevni til nevndina á umboðsráðsfundinum.

Við ársenda 2025 vóru hesir limir í tilráðingarnevndini:

- Rúni Heinesen (formaður)
- Símun Absalonsen
- Elsuba Poulsen
- Rakul B. Gardar

### Stjórn

Stjórn Sparikassans er mannað av stjóranum, ið hevur dagligu leiðsluna av Sparikassanum um hendi.



FYRISTØÐA HJÁ NORÐOYA SPARIKASSA






## Málsetningur fyri undir-umboðaða kynið í nevndini

Fyri at tryggja fjølbroytni í nevndini samtykti nevndin hin 27. februar 2025 eitt mark fyri partinum av tí undirumboðaða kyninum í nevnd Sparikassans. Sparikassin miðar ímóti, at talið av umboðsráðsvaldum nevndarlimum av tí undirumboðaða kyninum skal í minsta lagi vera 40 % frá 2028.

## Sunn virkismentan

Sparikassin hevur eina røð av politikkum og mannagongdum, hvørs endamál er at stuðla upp undir eina góða mentan og atferð. Politikkurin fyri sunna virkismentan setur karmarnar fyri eina sunna og ábyrgdarfulla virkismentan, ið verður tryggjað gjøgnum váðavit, hóskandi atferð og opið samskifti. Hetta skal tryggja, at starvsfólk kenna seg trygg við at venda sær til leiðsluna, um tey uppliva viðurskifti, ið eru átaluverd, ella fáa kunnleika ella illgruna um lógarbrot ella óetisk viðurskifti.

Sammett við onnur lond er váðin fyri mutri í Føroyum lágur. Mutur kann bæði vera penga- og/ella tænastusvik, avnoyðsla ella serviðferð. Fyri at umgangast, at Sparikassin verður nýttur til mutur, hava vit m.a. gávu- og aðrar politikkir, ið skulu tryggja, at samstarvið millum starvsfólk og viðskiftafólk er óheft og gegnigt.

Norðoya Sparikassi ynskir at hava eitt opið samskiftis-umhvørvi. Leiðslan væntar, at starvsfólk hava eina konstruktiva og kritiska tilgongd til sítt arbeiði, og at tey beinanvegin boða frá, um tey fáa kunnleika til, ella illgruna um, lógarbrot.

## Whistleblower-skipan

Sparikassin hevur eina whistleblower-skipan, sum gevur starvsfólkum møguleika at fráboða álvarslig brotsverk, so sum mutur, korruptión og innanhýsishandil (insider trading) á dulnevndan hátt. Whistleblower-politikkurin ásetir greiðar karmar fyri skipanina og tryggjar, at fráboðanir verða viðgjørdar í trúnaði og á fakliga haldgóðan hátt.

Fráboðanir verða móttiknar av einum góðkendum persóni. Viðgerðin av fráboðanum fer fram sambært skjalfestum mannagongdum, sum tryggja eftirlit og trúnað, soleiðis at einans persónar við sakligari grundgeving hava atgongd til innihaldið í málinum.

Fyri at verja tann, ið hevur boðað frá, tryggjar politikkurin, at eingin verður útsettur fyri neiligum mótspæli, og at dulnevni og trúnaður um samleikan hjá tí, ið hevur fráboðað, verða varðveitt.

Ábyrgdarhavandi av whistleblower-skipanini kann í samstarvi við nevndarformannin taka avgerð um, um tørvur er á innanhýsis ella uttanhýsis hjálp til at handfara eina ávísa fráboðan. Fráboðanir kunnu m.a. vera:

- Brot á hvítvaskingarlógina
- Brot á lógina um fíggjarligt virksemi
- Óreglusemi í.s.v. bókhald og innanhýsis kontroll
- Ábendingar um fíggjarlig brotsverk, m.a. skjalafalsan, svik, mutur ella líknandi

## Hvítting og fígging av yvirgangi

Norðoya Sparikassi leggur stóran dent á, at arbeitt verður ímóti fíggjarligum brotsverkum so sum hvítting, mutri, sviki o.ø. Lógin um hvítting áleggur m.a. peningastovnunum at hava eftirlit við hvítting. Hetta hevur Sparikassin tikið til sín og hevur sett fólk til at hava eftirlit við og forða fyri, at Sparikassin verður misnýttur til hvítting og/ella fígging av yvirgangi.

Hvítvaskpolitikkurin hjá Sparikassanum ásetir yvirskipaðu leiðreglurnar fyri arbeiðið at fyribyrgja hvítting, fígging av yvirgangi og øðrum fíggjarligum brotsverkum og hevur til endamáls at stýra og avmarka teir váðar, sum Sparikassin er útsettur fyri á hesum øki. Hvítvaskpolitikkurin hjá Sparikassanum verður javnan dagførdur við bæði lóggávudagføringum og Sparikassans praksissi, og tekur hædd fyri galdandi váða í samfelagnum.

Av hesi orsøk kann tað hjá kundum okkara tykjast løgið og nærgangandi, tá brádliga spurt verður eftir samleikaprógvi, hvar peningurin stavar frá ella skal nýtast til. Sum peningastovnur eru vit tó noydd at vita, hvussu kundar okkara nýta okkum sum peningastovn. Hetta fyri at tryggja, at tingini eru í lagi, og fyri at skilja ímillum tað, sum er vanligt, og tað, sum er óvanligt.





## Leypandi menning og útbúgvingar

Øll starvsfólk skulu regluliga luttaka í kravdari frálæru og venjing av sínum kunnleika innan týðandi øki so sum hvítvask, netváðar (cyberváðar) og GDPR. Undirvísingin er bæði fysisk og talgild og er løgd til rættis í jøvnum tíðarbilum og verður tillagað til arbeiðsuppgávurnar hjá starvsfólkunum fyri at tryggja viðkomandi innihald. Sparikassin hevur tillagað hesa venjingina, soleiðis at øll starvsfólk virkið og tilvitað taka støðu til vandan fyri at verða misnýtt í sambandi við dátastuldur, hvítvasking og fígging av yvirgangi.

## Dátatrygd

Vit liva í einum alsamt meira talgildum heimi, sum hevur sínar fyrimunir, men tað setur eisini krøv til Sparikassan. Dátavernd, nettrygd og tagnarskylda hava tí alstóran týdning, og er tað okkara skylda at handfara persónsupplýsingar um viðskiftafólk og starvsfólk á ein tryggan og virðiligan hátt og undir strangari tagnarskyldu.

Sparikassin er væl vitandi um, at talgildingin er viðvirkandi til ein øktan váða fyri netálopum. Tí leggja vit stóran dent á at hugsa um KT-trygd í øllum mannagongdum og skipanum. Arbeitt verður støðugt við at styrkja um trygdina bæði innanhýsis og í samstarvi við Elektron og NBS, sum eisini eru okkara dátamiðstøðir.

| Undirvísingarevni | Endamál | Luttakarar |
|---|---|---|
| Fyribyrging av hvítting og fígging av yvirgangi | Starvsfólk skulu við jøvnum millumbilum ígjøgnum frálæru í galdandi reglum um hvítting, fígging av yvirgangi og sanktiónir. Frálæran verður skipað eftir starvsfunksjón og skal tryggja, at starvsfólkið hevur eina fatan av váðum og kunnleika til tær skyldur, sum hvørt einstakt starvsfólk hevur. | Øll viðkomandi starvsfólk |
| Handfaring av persónsupplýsingum | Starvsfólk skulu við jøvnum millumbilum ígjøgnum frálæru í galdandi reglum um viðgerð av persónsupplýsingum umframt aðrar innanhýsis reglur í hesum sambandi. Frálæran skal tryggja, at starvsfólk hava eina greiða fatan av reglum, umframt kunnleika til tær skyldur, sum bæði Sparikassin og hvørt einstakt starvsfólk hevur. | Øll viðkomandi starvsfólk |
| Tagnarskylda, dátavernd og nettrygd | Starvsfólk skulu við jøvnum millumbilum kveikja sína tilvitsku við frálæru í awareness. Í frálæruni verða m.a. tagnarskylda, handfaring av skjølum og trygg atferð á netinum umrødd. | Øll starvsfólk |





# ESG-LYKLATØL

## ESG KEY FIGURES

ESG er ein stytting fyri Environmental, Social og Governance – Á føroyskum ein stytting fyri Umhvørvi, Sosialt og Leiðsla.

ESG-frágreiðingin hevur lyklatøl, ið lýsa, hvar Norðoya Sparikassi stendur viðvíkjandi umhvørvi, tí sosiala og leiðslu.

### Umhvørvi / Environment

| Lyklatøl | Eind | 2025 | 2024 | 2023 | 2022 | 2021 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| $CO_2$e, Vav 1 | t | 54 | 63 | 84 | 129 | 131 |
| $CO_2$e, Vav 2 | t | 51 | 45 | 46 | 35 | 42 |
| Orkunýtsla | GJ | 1.248 | 1.421 | 1.568 | 2.034 | 2.027 |
| Varandi orka | % | 22 | 20 | 16 | 10 | 7 |
| Burturkast frá rakstri* | t | 9,6 | 5,8 | 6,0 | 5,7 | 9,4 |

** Fevnir bert um virksemið í Klaksvík*

### Sosialt / Social

| Lyklatøl | Eind | 2025 | 2024 | 2023 | 2022 | 2021 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Fulltíðararbeiðsmegi | FtE | 52,1 | 50,3 | 46,4 | 45,5 | 44,9 |
| Kynsfjølbroytni | % | 60,7 | 64,5 | 58,8 | 55,0 | 59,0 |
| Lønarmunur millum kyn | Ferðir | 1,2 | 1,2 | 1,2 | 1,1 | 1,2 |
| Starvsfólkaskifti | % | 13,4 | 3,8 | 8,6 | 4,4 | 2,0 |
| Frávera vegna sjúku | Dagar/FtE | 10,1 | 10,3 | 8,9 | 17,7 | 6,7 |
| Kynsfjølbroytni á leiðslustigi | % | 37,5 | 25,0 | 25,0 | 37,5 | 37,5 |

### Leiðsla / Governance

| Lyklatøl | Eind | 2025 | 2024 | 2023 | 2022 | 2021 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Kynsfjølbroytni í Umboðsráðnum | % | 21 | 21 | 21 | 23 | 23 |
| Kynsfjølbroytni í nevndini | % | 33 | 33 | 33 | 33 | 17 |
| Uppmøting til nevndarfundir | % | 97,8 | 93,1 | 91,7 | 96,0 | 95,6 |
| Lønarmunur millum stjóra og starvsfólk | Ferðir | 5,0 | 4,9 | 4,9 | 4,9 | 4,9 |

## Nýttur roknskaparháttur

**$CO_2$e, Vav 1**

Samanhangur og eyðmerking

Beinleiðis útlát frá forbrenningini av brennievnum og tilfari. Sum oftast er $CO_2$e ikki mátað, men útroknað; hetta er grundað á mát frá brúktum tilfari, t.e. olju, gassi, diesel, bensini og øðrum. Mongdin av brendum brennievni/tilfari er faldað við umformarum fyri útlát av teimum 7 Kyoto-gassunum: ($CO_2$e), ($CH_4$), ($N_2O$), (HFC), (PFC), ($SF_2$) og ($NF_3$). Hesi vakstrarhúsgass hava ymiska ávirkan á altjóðaupphitingina og verða tískil umroknað til $CO_2$-líknandi útlát ($CO_2$e) við at falda hetta við teirra individuella GWP-faktor.

Í framtíðini verður møguligt at brúka hesar dátur sum samanberingargrundarlag við dátur frá Hagstovu Føroya.

Frymil

Vakstrarhúsgassútlát eru útroknað fyri hvørt brent tilfar, t.d. $CH_4$ = (slagið av tilfarinum, sum er brent (t) × tað samsvarandi virðið av $CO_2$ fyri tilfarið). Eind: Tons. Tá øll útlát eru útroknað, verða tey samanløgd til tons av samsvarandi $CO_2$ (t$CO_2$e).

Tilvísing: GRI 305: Útlát 2016.

**$CO_2$e, Vav 2**

Samanhangur og eyðmerking

Óbeinleiðis útlát frá orku til at framleiða ravmagn ella fjarhita, sum felagið hevur keypt til sína nýtslu. Vav 2-útlát eru eftir einari meginreglu útroknað á sama hátt sum Vav 1-útlát; tó verða vanliga ikki øll Kyoto-gass tikin við.

Fyrivarni skal takast fyri nýtslu av ravmagni og fjarhita, sum má vera innsavnað fyri hvørt landið sær (um fyritøkan hevur virksemi uttan fyri Føroyar), tí at tað eru týðandi frávik í útlátinum av $CO_2$e millum lond, og tískil er umrokningarfaktorur útroknaður fyri hvørt landið sær.

Í framtíðini verður møguligt at brúka hesar dátur sum samanberingargrundarlag við dátur frá Hagstovu Føroya.

Frymil

Vav 2-útlát verður útroknað fyri hvørt land pr. keyptan MWh av ravmagni og/ella av fjarhita. T.d. $CH_4$ = (keypt MWh ella GJ×$CH_4$-faktorin fyri umskapan fyri hvørt land). Tá øll útlát eru útroknað, eru tey normaliserað til $CO_2$e. Eind: Tons.

Tilvísing: GRI 305: Útlát 2016.

**$CO_2$e, Vav 3**

Samanhangur og eyðmerking

Vav 3-útlát er annað óbeinleiðis útlát, ið stavar frá virksemi felagsins, men sum fyritøkan ikki eigur ella hevur ræðið á. Útlátið stavar frá veitingarketuni (upstream) og hjá brúkaranum (downstream). Dømi um virksemi, ið stavar frá veitingarketuni, er m.a. útvinning og framleiðsla av keyptum tilfari, flutningur av keyptum brennievni og endaliga nýtslan av vørum og tænastum.

Frymil

Vakstrarhúsgassútlát eru útroknað fyri hvørt brent tilfar fyri hvønn bólk í vavi 3. Eind: Tons.

Tilvísing: GRI 305: Útlát 2016.

**Orkunýtsla**

Samanhangur og eyðmerking

Ein fyritøka kann nýta orku í fleiri ymiskum formum sum t.d. brennievni, ravmagn, sjóhita o.s.fr. At nýta orku meira gagnligt og at brúka eina blanding av varandi orkukeldum er týðandi fyri stríðið ímóti veðurlagsbroytingum og fyri at minka um kolevnisfótasporið hjá fyritøkuni.

Orka er sum útlát vanliga útroknað sum nýtsla faldað við samsvarandi virðinum. Nýtt orka skal verða tikin frá bæði Vavi 1- og 2-keldum, men má eisini hava orkuna frá varandi orkukeldum við.
Í framtíðini verður møguligt at brúka hesar dátur sum samanberingargrundarlag við dátur frá Hagstovu Føroya.

Frymil

Orkunýtslan = (slagið av brendum brennievni (t) × orkufaktorurin fyri slagnum av brennievni) + (Brúkt ravmagn (herav frá varandi orkukeldum) (MWh) ×3,6) + (Brúktur fjarhiti/-kuldi við varandi orkukeldum(GJ)). Eind: GJ.

Tilvísing: GRI 302: Orka 2016.

**Varandi orka**

Samanhangur og eyðmerking

Hetta lyklatalið vísir, hvussu stórur partur av orkuni, sum verður nýtt, er frá varandi orkukeldum. Hetta kann eisini verða mátað sum varandi orka ímóti ikki-varandi orku, men so vil ávirkanin vera ómøgulig at máta fyri tær fyritøkur, ið einans hava varandi orku. Í Føroyum ger Elfelagið SEV eina uppgerð av, hvussu býtið av varandi orku er í mun til ikki-varandi orku.

Frymil

Varandi orkubýti = (varandi orka/øll orka) × 100. Eind: %.

Tilvísing: GRI 302: Orka 2016.

**Burturkast**

Samanhangur og eyðmerking

Burturkast, sum stavar frá rakstrinum hjá fyritøkuni, t.d. av framleiðsluni av vørum og tænastum. Burturkast kann hava týðandi negativa ávirkan á umhvørvið og vælveruna hjá menniskjum, tá tað ikki er rætt handfarið. Óneyðugt burturkast kann verða sæð sum eitt slag av fíggjarligum spilli.

Frymil

Øll vektin av burturkasti, sum er burturbeint í tonsum, er greinað í bólkar og í, hvussu tað verður burturbeint. Eind: Tons.

Tilvísing: GRI 306: Burturkast 2020.

**Fulltíðararbeiðsmegi**

Samanhangur og eyðmerking

Til at máta talið av fulltíðarstarvsfólkum er neyðugt at taka við beinleiðis fulltíðarstarvsfólk og fyribilssett starvsfólk. Harumframt krevur ársroknskaparlógin fyri størri feløg, at ársverk verða upplýst. Til hetta krevst ein útrokning fyri fulltíðarstarvsfólk í meðal (ársverk) (hetta merkir fulltíðarstarvsfólk + lønt yvirtíð + ársverk – útroknað tímalønt starvsfólk + ársverk útroknað fyribilsstarvsfólk).

Í framtíðini verður møguligt at brúka hesar dátur sum samanberingargrundarlag við dátur frá Hagstovu Føroya.

Frymil

Fulltíðarstarvsfólk = Ársverk + fyribils starvsfólk. Eind: Fulltíðarstarvsfólk.

Tilvísing: ÁRL, GRI 2 Aðalkunngerðir 2021.

**Kynsfjølbroytni**

Samanhangur og eyðmerking

At tryggja at margfeldi og javnstøðu á arbeiðsplássinum kann hava felags fyrimunir, tí at javnstøða kann viðføra fíggjarliga menning.

Í framtíðini verður møguligt at brúka hesar dátur sum samanberingargrundarlag við dátur frá Hagstovu Føroya.

Frymil

Kynsmargfeldi = ((Ársverk hjá kvinnum + fyribils kvinnulig starvsfólk) / (Fulltíðarstarvsfólk)) × 100. Miðalaldur: (Aldur tilsamans) / (Ársverk). Annað: Brúk er fyri nágreining.

Tilvísing: GRI 405 Margfeldni og javnstøða 2016.

Lønarmunur millum kyn

Javnstøða í lønum – íroknað pensjónir o.s.fr. Hvussu ofta kann kvinnuliga medianlønin verða dekkað av mannligu medianlønini? Arbeitt verður við medianløn heldur enn miðaltalinum fyri ikki at skeikla lyklatalið við óvanliga høgum ella lágum starvsfólkalønum.

Frymil

Lønarmunur millum kyn = Medianløn menn / Medianløn kvinnur. Eind: Ferðir.

Tilvísing: Finansforeningens Nøgletalsvejledning, Nasdaq (2019) ESG Reporting. Guide 2.0, S2.

**Starvsfólkaskifti**

Samanhangur og eyðmerking

Broyting í starvsfólkahópi verður útroknað við bæði sjálvráddari fráfaring og ikki-sjálvráddari fráfaring. Fráfaring vegna aldur verður í hesum førum sæð sum ikki-sjálvrádd fráfaring. Gevið gætur, at hetta er einans útroknað fyri egin ársverk.

Frymil

Broyting í starvsfólkahópi = ((Sjálvrádd + ikki-sjálvrádd fráfaring) / Ársverk). Eind: %.

Tilvísing: GRI 401: Starvssetan 2016.

### Frávera vegna sjúku

### Samanhangur og eyðmerking

Talið av øllum arbeiðsdøgum, har starvsfólk eru sjúk og ikki til arbeiðis, í mun til talið av ársverkum. Barsil er ikki íroknaður.

### Frymil

Sjúkradagar = (Talið av sjúkradøgum fyri øll ársverk fyri tíðarskeiðið) / (Ársverk). Eind: %.

Tilvísing: OECD-heilsuhagtøl 2020, greining, keldur og mannagongdir.

### Kynsfjølbroytni á leiðslustigi

Fevnir um leiðslu og starvsfólk í leiðandi størvum við starvsfólkaábyrgd. Lýsingin av leiðandi starvi vil vera grundað á leiðslubygnaðin hjá fyritøkuni. Uppgjørt í FtE.

### Frymil

Kynsfjølbroytni á leiðslustigi = kvinnuligir leiðarar / allir leiðarar. Eind: %.

Tilvísing: Finansforeningens Nøgletalsvejledning.

### Kynsfjølbroytni í Umboðsráðnum

### Samanhangur og eyðmerking

Tá ein fyritøka eggjar regluliga til javnstøðu og margfeldi til arbeiðis, kann tað skapa fyrimunir fyri fyritøkuna og samfelagið sum heild, tí javnstøða fremur búskaparligan vøkstur. Kynsmargfeldið fyri umboðsráðsvaldar sessir á umboðsráðsvalinum er roknað við endan av roknskaparárinum.

### Frymil

Kynsmargfeldi, Umboðsráð = ((Umboðsráðsvald kvennkyn í umboðsráðnum) / (Allir umboðsráðsvaldir limir)) × 100. Eind: %.

Tilvísing: GRI 405 Kynsmargfeldið og javnur møguleiki 2016. Donsk tilmæli fyri vinnuliga leiðslu (2020).

### Kynsfjølbroytni í nevndini

### Samanhangur og eyðmerking

Tá ein fyritøka eggjar regluliga til javnstøðu og margfeldi til arbeiðis, kann tað skapa fyrimunir fyri fyritøkuna og samfelagið sum heild, tí javnstøða fremur búskaparligan vøkstur. Kynsmargfeldið fyri nevndarvaldar sessir á aðalfundinum er roknað við endan av roknskaparárinum.

Í framtíðini verður møguligt at brúka hesar dátur sum samanberingargrundarlag við dátur frá Hagstovu Føroya.

### Frymil

Kynsmargfeldi, nevnd = ((Aðalfundarvald kvennkyn í nevnd) / (Allir aðalfundarvaldir nevndarlimir)) × 100. Eind: %.

Tilvísing: GRI 405 Kynsmargfeldið og javnur møguleiki 2016. Donsk tilmæli fyri vinnuliga leiðslu (2020).

### Uppmøting til nevndarfundir

### Samanhangur og eyðmerking

Mátar fundarvirksemið hjá nevndarlimum.

### Frymil

Uppmøting til nevndarfundir = ((Talið av nevndarfundum fyri hvønn nevndarlim) / (Talið av nevndarfundum × Talið av nevndarlimum)) × 100. Eind: %.

Tilvísing: Donsk tilmæli fyri vinnuliga leiðslu (2020).

### Lønarmunur millum stjóra og starvsfólk

### Samanhangur og eyðmerking

Hvussu ofta medianlønin hjá starvsfólkunum kann verða dekkað av samsýningini til stjóran er ein meting fyri sosial javnrættindi. Arbeitt verður við medianløn heldur enn miðaltalinum fyri ikki at skeikla lykiltalið við óvanliga høgum ella lágum starvsfólkalønum.

### Frymil

Lønarmunur millum stjóra og starvsfólk = Samsýning til stjóra / Median-starvsfólkaløn. Eind: Ferðir.

Tilvísing: Finansforeningens Nøgletalsvejledning, Nasdaq (2019) ESG Reporting. Guide 2.0, S1.

NORÐOYA
SPARIKASSI

**Høvuðsdeildin**
Ósávegur 1
Postboks 149
FO-710 Klaksvík
Tel. +298 475000
ns@ns.fo
www.ns.fo

**Deildin í Fuglafirði**
Í Støð 7
FO-530 Fuglafjørður
Tel. +298 475000

**Deildin í Tórshavn**
Óðinshædd 11
FO-100 Tórshavn
Tel. +298 475000